# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hans Jacob Justesen,** Klaksvík, andaðist í heiminum leygardagin 3. desember, 93 ára gamal. Farið verður úr kapellinum týskvøldið klokkan 18 heim í Betesda. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Hans Jacob kunnu lata Akrinum eina peningagávu. Konto í peningastovunum.

**Axel Haraldsen,** Tórshavn, ættaður úr Sørvági andaðist 5. desember, 59 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Anders Mosbjerg Christensen** í Vági andaðist 4. desember á Ellisheiminum á Tvøroyri, 78 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum hósdagin klokkan 17.30. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju fríggjadagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

**Marjun Skaale Dánjalsdóttir** fór til gravar úr Berøa og út í kirkjugarðin á Nesi týsdagin kl. 13. Tey, sum vilja minnast Marjun, kunnu geva eina peningagávu til Føroya Felag Móti Krabbameini.

**Ole Johannes Olsen,** vanliga nevndur Jóannes, ættaður úr Skopun, búsitandi í Nyker á Bornholm, andaðist 5. november í Hantsholm, 39 ára gamal.

Jarðarferðin verður leygardagin 10. desember kl. 11.00 úr kapellinum í Rønne.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at okkara elskaði pápi, sonur og beiggi

**Ole Johannes Olsen**

Vanliga nevndur Jóannes

Ættaður úr Skopun, búsitandi í Nyker á Bornholm,
andaðist í Hanstholm 5. november, 39 ára gamal.

Jarðarferðin verður leygardagin 10. desember
kl. 11.00 úr kapellinum í Rønne,
Sønder Allé 22, 3700 Rønne.

*Fyri tey avvarðandi*
**Børnini, mamma, pápi og systkin**

# Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum við gávum, blómum, telegrammum og uppringingum gleddu meg á 70 ára føðingardegnum. Somuleiðis tøkk til tykkum øll, sum komu inn á gólvið og gjørdu mær dagin so hugnaligan.

**Bestu heilsur**
**Søster Olsen**

Sjúrður Johannesen, Hoyvík:

# Settur í starv hjá Bláa Krossi Føroya



Blái Krossur Føroya hevur sett Sjúrð Johannesen í starv frá 1. januar 2006, har hann kemur at arbeiða við fyribyrgjandi og upplýsandi arbeiði.

Sjúrður er útbúgvin sosialráðgevi í Århus í 1989. Hann hevur síðan arbeitt fýra ár á Almannastovuni og 10 ár hjá Barnaverndini í Tórshavnar kommunu. Í hesum sambandi hevur Sjúrður verið nógv úti og havt fyrilestrar á skúlum og øðrum stovnum.

Sjúrður er 44 ára gamal, føddur og uppvaksin í Havn. Hann er giftur og eigur trý børn.

Fyri 30 árum síðan:

# Nýggj bilferja til sigling um Vestmannasund



Í desember 1975 kom nýggja bilferjan SAM II til landið. Tað var Alfred Olsen í Vestmanna, sum hevði latið ferjuna byggja til ferðafólka- og bilflutning um Vestmannasund - millum Vestmanna og Oyrargjógv.

SAM II avloysti SAM I, sum tá hevði siglt um Vestmannasund síðan 1969. SAM I varð síðan seldur til Orknoyar.

SAM II, ið tekur 20 bilar og 150 ferðafólk, var 1. apríl 1976 yvirtikin av Føroya Landsstýri. Keypsprísurin var 6,2 mill. krónur.

*Kelda: Myndaárbókin - árið ið fór 1976*